FØROYA BRANDSKÚLI

# Avloysarastarv á Føroya Brandskúla

**Starvið**
Undirvísing í brunaverju, eldsløkking og roykkaving.
Til- og avriggan í samband við skeið.
Viðlíkahald av sløkki- og aðrari útgerð og bygningum.

Tey, ið fáa upplæring í eldsløkking á Føroya brandskúla, eru í høvusheitinum: Sjófólk, sløkkiliðsfólk og starvsfólk á virkjum og stovnum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum brunaumsjónarmaður, ella útbúgving sum kann síðustillast.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur við at arbeiða við teldu.

Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera fyrikomandi, ágrýtnir og førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Starvstíðin er í fyrsta umfari 1 ár, men kann gerast eitt framtíðarstarv.

Lønar- og setanartreytir annars, verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið - Maskinmeistarar í almennari tænastu á landi.

**Umsóknir**
Umsóknir, við møguligum prógvum, skulu sendast til:

**Føroya sjómansskúla**
Postrúm 104
Nóatún 2
FO-110 Tórshavn
Att.: Hans Johannes á Brúgv stjóri

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann: 19. januar 2006, innan kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til: Signheðin Davidsen á tlf. 422354.

Føroya Brandskúli · FO-430 við Áir
Tlf. +298 422354 · Fax +298 422452
fire-fight.fo · www.fire-fight.fo

RUNAVÍKAR KOMMUNA.

**Runavíkar kommuna søkir eftir**

# Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari og ein barnagarðsstova við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 3 pedagogum á 35/40 t. um vikuna.

Setan verður frá 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara ella Conny Jacobsen, varðaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. januar 2006, kl. 12,00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# SKRIVSTOVUHØLIR Í SALTANGARÁ



Á Heiðavegi 15 í Saltangará eru nýggj skrivstovuhølir tøk til leigu.

Talan er um tvey høli á 26,5 og 35 fermetrar. Hølini kunnu brúkast saman ella hvørt sær.

*Áhugaði kunnu síggja hølini við at venda sær til:*

## ERO P/f, tel 44 96 12

# TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

**Fundir hjá Tórshavnar býráð í 2006**

Í 2006 hevur Tórshavnar býráð regluligan fund hesar hósdagar, kl. 18.00:

| | |
|---|---|
| 26. januar | 29. juni |
| 23. februar | 21. september |
| 23. mars | 26. oktober |
| 27. apríl | 16. november |
| 18. mai | 14. desember |
| 8. juni | |

SNARSKIVAN

# Saltspreiðarar og saltkassar





**Kaj Andreasen & Co**
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

# Bygningur í Álakeri



Umleið 360 m² verða hervið lýstir til leigu í bygninginum niðri í Álakeri, Tórshavn.

Høllin er í einum og er væl egna til goymslu o.l.

Av tí at Álakeri serliga skal nýtast til sjóvinnuna, hevur hetta fyrimun.

Áhugaði biðjast venda sær til:

**P/F Farcod**
Traðagøta 43
165 Argir
Tel.: 31 93 33
Fax: 31 82 03
e-mail: farcod@post.olivant.fo

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480